## Heimsins sterkasta øl

Alkoholstyrkin í skotska Tactical Nuclear Penguin er ikki minni enn 32 volumuprosent. Við hesum er ølin frá Brewdog-bryggjarínum nú ovast á listanum yvir sterkastu ølirnar í heiminum. Gamla metið hevði týska merkið, Schorschbraer, sum hevði eina styrki upp á 31 volumuprosent. - Hetta snýr seg um at flyta mørkini innan ølbrygging, og tað snýr seg um at fáa innovatión í øl-ídnaðin, sigur James Watt, stjóri á Brewdog við BBC. Hann mælir sjálvur til, at ølin verður drukkin í sera smáum nøgdum, tí endamálið er at njóta smakkin heldur enn at drekka seg fullan, sigur hann. Og er tað fyri alkoholnøgdina, at ølið skal keypast, so er helst bíligari at keypa onnur og meira vanlig merki. Prísurin fyri eina fløsku av Tactiacal Nuclear Penguein liggur nevnliga um tær 250 krónurnar.



# Hvalbingar keypa fisk úr Saltangará



*Hvalbingar hava keypt fisk norðanfjørðs til virkingar á flakavirkinum. Fleiri av lemmatrolarunum fiska í Norðsjónum í løtuni og landa veiðina í Hanstholm. Millum hesar er Sjagaklettur*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Fleiri lemmatrolarar fiska í løtuni upsa í Norðsjónum og landa veiðina í Hanstholm. Upsafiskiskapurin undir Føroyum er slakur í løtuni, og tí kemur lítil upsi til virkingar á føroysku fiskavirkjunum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mánadagin landaðu ísfiskatrolararnir Hamranes og Breiðanes. Teir høvdu umleið 150.000 pund av upsa, sum fiskavirkið TG Seafood í Hvalba keypti til virkingar.

Veiðan hjá ísfiskatrolarunum hevur sum heild verið smálig í heyst. Skip hava havt onkrar einstakar góðar túrar, men sum heild hevur fiskiskapurin verið slakur.

Á TG Seafood vænta tey ikki fleiri landingar hesa vikuna, men virkið hevur keypt nakað av upsa úr Saltangará.

Ein bilur við eini dagsframleiðslu á virkinum í Hvalba kom soleiðis suður við Smyrli í morgun.

### Í Norðsjónum

Fleiri av lemmatrolarunum hava seinastu tíðina roynt eftir upsa í Norðsjónum og hava landað veiðina í Hanstholm.

Sum skilst, hava Steintór, Sjagaklettur, Beinisvørð og Vesturleiki fiskað av føroyskari upsakvotu í Norðsjónum í heyst.

# Upsi og toskur

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Føroyska upsaveiðan hevur verið rættiliga góð í nógv ár – ja, næstan heilt síðan fiskifrøðingar í endanum av nítiárunum komu við ávarðingum um upsastovnin, sum skuldi vera so illa fyri, at øll veiðan helst skuldi steðgast.

Síðan tann dag hava skip, sum fiska upsa, næstan siglt full undir lúkurnar.

Nøkur ár herfyri var upsin rættiliga smáur, men seinnu árini hevur støddin verið betri.

Í vár høvdu skipini góða upsaveiði, men í heyst eins og í fjør heyst hevur veiðan verið í lakara lagi.

Upsafiskiskapur kann vera skiftandi, og fyrr í heyst gjørdu partrolarar góðar túrar, men sum heild hevur veiðan ikki vignast seinasu tíðina.

Fyrr í heyst gjørdu vestmannatrolararnir, Fram og Vestmenningur, roktúr, har teir høvdu fleiri enn 500.000 pund.

Verður hugt at landingartølum hjá partrolarum seinastu tíðina, hevur veiðan ikki verið nakað at reypa av, men menn hava vónir um, at góða veiðan fer at taka seg uppaftur.

Nú toskafiskiskapurin er við at taka seg uppaftur, er hugsandi, at upsaveiðan generelt kanska fer at vera heldur lakari, enn hon hevur verið.

Hampiliga stórar nøgdir verða í løtuni veiddar av toski 3 og 4. Hetta er heldur smáur fiskur, men um vakstrarlíkindini vera góð í komandi tíðum, verður hesin fiskurin betri til støddar um eitt til tvey ár.

# Einki røkist fyri semju

**Eftir øllum sólarmerkjum at døma, fer einki at spyrjast burtur úr fiskiveiðisamráðingunum millum Føroyar og Rusland, sum hava verið á Gjáargarði síðan mánadagin**
**Í dag fer russiska samráðingarnevndin avstað aftur**

SAMRÁÐINGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Skálaberg-málið hevur lagt stórar skuggar yvir hesar samráðingarnar, sigur Viberg Sørensen, formaður í Føroya Reiðarafelag*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Hóast hetta er triði samráðingardagurin, har Føroyar og Rusland sita saman á Gjáargarði, er ikki líkt til, at nøkur nýggj fiskiveiðiavtala millum londini verður undirskrivað í dag.

Viberg Sørensen, formaður í Reiðarafelagnum, sum er við í hesum samráðingum, segði í morgun, at russiska samráðingarnevndin, sum telir 17 fólk, fer avstað aftur seinnapartin í dag.

- Soleiðis, sum út sær í løtuni, kemur neyvan nøkur nýggj avtala í hús í dag, sigur reiðarafelagsformaðurin.

Spurdur, hvørji stríðsmálini eru, sigur Viberg Sørensen seg ikki kunna útgreina nøkur einstøk mál, men leggur aftrat, at tað ikki er nakað óvanligt, at partarnir ikki kunnu semjast við fyrsta samráðingarumfar.

Hann dugir kortini ikki at siga, nær partarnir hittast aftur til fundar, um eingin semja fæst millum londini í dag.

### Stórir skuggar

Seinnapartin í gjár segði Viberg Sørensen, at Skálaberg-málið hevur lagt ein stóran skugga yvir samráðingarnar við russar hesaferð.

- Málið um, at Skálaberg nú hevur verið afturhildin í Murmansk í skjótt 14 dagar, er sjálvandi ikki partur av hesum samráðingum, men tað skerst ikki burtur, at henda træta hevur lagt stórar skuggar yvir samráðingarnar, sigur formaðurin í Reiðarafelagnum.

Samráðingarnar millum Føroyar og Rusland byrjaðu mánadagin, og í morgun klokkan 8 sessaðust partarnir aftur við Gjógv.

Soleiðis, sum støðan var fyrrapartin, var ikki líkt til, at nøkur avtala verður undirskrivað í dag.